Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Liðugt viðgjørd á sjúkrahúsunum

Spurningar:

1. Hvussu nógv hava liðugt viðgjørdir sjúklingar á sjúkrahúsunum kostað sjúkrahúsverkinum, og hvussu nógv hava tey verið árini 2015-2023?
2. Hvussu stórur partur av hesum hava verið yvir 67 ár?
3. Hvørja hugsan hevur landsstýriskvinnan um at taka gjøld frá avvarðandi myndugleikum fyri liðugt viðgjørdar sjúklingar, sum upptaka pláss í sjúkrahúsverkinum?

Viðmerkingar:
Í nógvum umførum hevur verið umrøtt, at tað er kostnaðarmikið og seinkar viðgerðum í sjúkrahúsverkinum, at so nógv liðugt viðgjørd eru inni á sjúkrahúsunum. Millum annað í 2013 varð umrøtt at seta eina skipan í verk, sum gav sjúkrahúsverkinum møguleika at senda rokning til avvarðandi myndugleikar fyri hesi liðugt viðgjørdu, men sum skilst bar tað arbeiðið ikki á mál. At taka gjøld fyri liðugt viðgjørd er tó ikki heilt ókent, tí tað hevur verið heimild fyri hesum galdandi fyri psykiatriska depilin í ávísum førum síðan 2011.

Verandi skipan, har onki gjald verður tikið frá avvarðandi myndugleika í flestu førum, merkir, at tað í nógvum førum kann vera ein beinleiðis sparing hjá millum øðrum Almannaverkinum og eldrasamstørvunum ikki at taka ímóti fólkum, sum tey annars hava ábyrgdina av.

Havandi hetta í huga, umframt skjótt vaksandi bíðilistarnar til nógvar viðgerðir orsakað av verkfallinum í heyst og at líknandi skipanir ikki eru ókendar í okkara grannalondum, verða hesir spurningar settir landsstýriskvinnuni.

Á Løgtingi, 23. november 2023

Eirikur í Jákupsstovu